UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Dagfesting: **3. mai 2022**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-104**

Svar

upp á

§ 52a fyrispurning nr. 52-181/2021, frá Anniku Olsen, løgtingskvinnu, settur Jenisi av Rana, landsstýrismanni, um Fróðskaparsetrið og kampusætlan.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær kann væntast, at farið verður undir at byggja kampus á Frælsinum?
2. Hvussu nógv verður eitt kampus á Frælsinum mett at kosta at byggja?
3. Metir landsstýrismaðurin, at avsettu upphæddirnar á fíggjarlógini fyri ætlanina árini 2023 og 2024 eru nøktandi?

Svar

Til 1: Enn er ikki greitt, nær farið verður undir at byggja kampus á Frælsinum. Kampusbólkurin er í holt við at fyrireika eina arkitektakapping og við at skipa eina byggiskrá fyri økið. Eisini verður arbeitt við at greiða ognarviðurskiftini hjá Tórshavnar kommunu og landsstýrinum á tilætlaða økinum á Frælsinum.

Til 2: Samlaði kostnaðurin á kampus er enn ikki greiður, tí vit eru ov tíðliga í tilgongdini til at kunna gera eina samlaða kostnaðarmeting. Tó kann sigast, at ætlanin er at byggja kampus í fleiri stigum, soleiðis at kostnaðurin at byggja verður uppdeildur, sum er ein roynd at halda kostnaðinum fyri byggiverkætlanirnar niðri. Somuleiðis kann sigast, at við yvirtøkuni av økinum á Frælsinum, fylgir Venjingarskúlin við, sum Fróðskaparsetrið betri kann húsast í, eftir at landið hevur yvirtikið skúlan.

Fyri at Venjingarskúlin skal kunna húsa Fróðskaparsetrinum, krevjast ábøtur á skúlan, sum leysliga eru mettar at kosta kr. 144 mió., spjatt yvir eitt 6 ára tíðarskeið, fyri at umvæla allan skúlan. Verður hetta gjørt, verður Venjingarskúlin partur av einum komandi kampus, og leiguútreiðslur, sum Fróðskaparsetrið hevur í dag, verða spardar, har hesar sparingar skulu mótroknast í áðurnevnda kostnaði.

Til 3: Av tí at ætlanirnar enn eru komnar ov stutt, og kostnaðarmeting tí enn ikki fyriliggur, er ov tíðliga at siga, um merktu upphæddir á løgtingsfíggjarlógini eru nøktandi.

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður